# Løgtingsumboðsmaðurin – frustratión ella inspiration

Nøkur orð nú løgtingsumboðsmaðurin fyllir 10 ár

Sjúrður Rasmussen

## 1. Forvæntningar til og søga hjá føroyska løgtingsumboðsmanninum

Satt at siga hevur mær ongantíð dámt tað officiella heitið løgtingsins umboðsmaður. Eftir mínum tykki ger heitið, at man knýtir embæti nærri til Løgtingið, enn tað veruliga er. Tað virkar sum ein integrerað ogn hjá løgtinginum. Mær dámar betur at brúka samandrigna heitið løgtingsumboðsmaður. Tað útrykkir meira tað, sum embætið er, nevniliga at útinna eitt embætið vegna Løgtingið. Heitið situr í mínum máloyra eisini á einhvønn hátt betri. So eg fari at verða so framligur at brúka heitið løgtings¬umboðsmaðurin, sjálvt um hetta ikki er korrekt eftir løgtingslógini, har officiella heitið er løgtingsins umboðsmaður. Tað samsvarar eisini væl við, at føroyska umboðsmannalógin §1 ásetur, at tveir triðingar av løgtingsmonnunum kunnu loysa hendan úr starvi , meðan tann danski eftir teirra lóg § 3 kann setast frá við vanligum meiriluta.

Gjøgnum tíðirnar hevur argumentatiónsmátin hjá borgaranum veruliga flutt seg. Fyrr hevur argumentatiónsgrundarlagið verið annað enn juridiskt mótvegis fyrisitingini. Snúsfornuftur og logisk argument hava verið førd fram, kenslulig argument, líkheits argument, social argument, stættar argument og øll onnur góð argument, sum hava verið tøk hjá fólki, har meginparturin av fólkinum ikki hevur verið serliga væl skúlaður, og kommunikatiónsformarnir millum fólk fáir.

Søguliga kenna vit, at føroyingar hava skrivað kongi bræv. Inngangurin hevur verið “Vi fattige folk udi Færø”. Støðið er beinanvegin lagt, ein kenslulig argumentatión bygd á politisk social argument.

Síðan vit fingu heimastýrið í 1948, hevur man ikki altíð tikið lóggávuformalitetir hjá fyrisitingini í Føroyum so tungt. Man hevur ofta heldur lagt dent á politiskar realitetir í løgtinginum heldur enn formalitetir. Vit minnast øll løgtingslógina nr. 13 frá 2. mai 1967 um prioritetslån til fiskiskip, sum heimilað landsstýrinum at veita veðhald, sum tilsamans ikki máttu fara upp um 50 mió. krónur. Trúliga vóru veðhald veitt við heimild í hesi lóg gjøgnum árini, og lítið er at ivast í, at farið var upp um hámarksupphæddina við veðhaldum. Tá ið tásitandi løgmaður varð konfronteraður við hetta, var svar hansara, at her var bara talan um formalitetir, Løgtingið var væl vitandi um øll veðhaldini, og ein løgtingsmeiriluti stóð inni fyri teimum via meirilutasamgongurnar, sum verið høvdu.

So hvørt fólkið verður skúlað, kommunikatiónsformarnir betri, og gongdin annars verður, at alt meira í samfelagnum verður stýrt lóggávuliga við lógum, kunngerðum og rundskrivum, har loyvi krevst frá tí almenna til bæði hetta og hitt frá eini alsamt veksandi fyrisiting, sigur tað seg sjálvt, at meira og meira kemur at snúgva seg um juridiska argumenatión frá borgarans síðu. Skal hann fáa sín rætt, má hann argumentera við tí grundarlagi, sum henda kompliceraða fyrisiting byggir sítt system uppá. Hann veit, at besta effektin er at halda seg til lóggávuargument og formalitetir.

Út frá hesum trúgvi eg, at man skal skoða ynski um løgtingsumboðsmannastovnin. Tann veiki borgarin vil eisini hava onkran at argumentera fyri seg, juridiskt. At stevna ber sjálvsagt til, men har skal bæði peningur og orka til hjá einstaklinginum. Í flestu førum vil hann ikki seta seg føran fyri tí.

Søgan um ætlanirnar at stovnseta ein løgtingsumboðsmannastovn í Føroyum er tvífald so long í tíð, sum søgan hjá eksisterandi løgtingsumboðsmannastovni.

Fyrstur at koma við uppskotið at seta á stovn løgtingsumboðsmannastovn er Jógvan Sundstein, løgtingsmaður og seinni løgmaður. Hann setur fram á løgtingi í august 1978 uppskot til samtyktar um at seta eina 5 manna løgtingsnevnd at gera eina skipan við løgtingsumboðsmanni. Hann heldur, at tað er rætt, at ein slíkur umboðsmaður verður settur, sum trygd hjá løgtinginum og bygda- og býráðnum, fyri at fyrisitingin virkar, sum hon skal. Legg til merkis hansara argumentatiónsmáta. Tað er trygdin hjá løgtinginum og ikki borgaranum, hann leggur dent á. Uppskotið fall rættuliga sannførandi á tingi, bert sjey atkvøður fyri.

Í apríl 1980 leggur Jógvan Sundstein uppskotið framaftur. Nú hevur hann fingið Karina Kjølbro afturat sær. Aftur nú fellur uppskoti á tingi. Ikki líka sannførandi sum seinast, nú vóru hóast alt 13 atkvøður fyri.

Í mars 1982 royna tey bæði seg aftur. Nú gongst betur 21 atkvøða fyri, og nevnd verður sett at fyrireika løgtingsumboðsmannastovn við so frægum fólkum sum Demmus Hentze, Trygva Samuelsen, Kára D. Petersen, Halgir Winther Poulsen og Karin Kjølbro. Verulig gongd kom ongantíð á arbeiði nevndarinnar. Tað steðgaði mest upp á skrivaraspurningin. Togast varð við landsstýrið um at fáa ein skrivara at hjálpa nevndini. Eitt skifti virkaði tann erfarni og gløggi løgfrøðingurin Klaus Hermann sum skrivari, men landsstýrið noktar honum at halda fram sum skrivari, tá ið hann gjørdist stjóri í landsfyrisitingini. Verulig gongd kom tí ongantíð á nevndararbeiði, nevndin lat onki álit og sovnaði snøgt sagt.

Í mars 1992 kemur málið aftur á ting, tí at Tjóðveldisflokkurin, sum hann tá æt, skjýtur upp fyri løgtinginum uppskot til samtyktar um at áleggja formansskapinum at seta eitt fólk við góðum kunnleika til samfelags-, stats- og fólkarætt at gera reglur fyri ein løgtingsumboðsmann. Grundgevingin er, at tá tað er við at gerast dagligur kostur, at politikarar og serliga landsstýrismenn verða skuldsettir fyri lógarbrot, og ongar veruligar royndir verða gjørdar fyri at reka hesar skuldsetingar aftur, verður hildið, at fólkaræðið er komið í ein ávísan vanda. Víst verður á, at bæði almennar og dulnevndar ákærur koma í móti fyrisitingini, sum bara roynir at tiga hesar burtur og bara tulkar tingsins avgerðir eftir egnum høvdi. Tí halda teir, at ein løgtingsumboðsmaður er uppá sítt pláss at tryggja løgtinginum og samfelagnum øllum móti skeivum og tilvildarligum avgerðum. Uppskotið varð samtykt við 19 atkvøðum.

Formansskapurin bar so í bandi, at peningur var settur av til kanningarnar komandi árini, og skrivstovustjórin hevði eisini samrøður við umboð fyri fólkatingsumboðsmannin um málið, men har hendi sum so ikki rættuliga nakað.

Stýrisskipanarnevndin, sum landsstýrið setti í 1993 at gera uppskot til nýggja innanhýsis stýrisskipan í Føroyum, var heldur skeptisk viðvíkjandi løgtingsumboðsmannastovni og hevði í uppskotinum onki uppskot um slíkan stovn, men mælti í staðin til at seta eina trýmanna nevnd av tingmonnum at hava slíkt eftirlit. Løgtingsnevndin, sum viðgjørdi málið, helt, at við tað at tingið hevði samtykt uppskotið,

um at formansskapurin skuldi viðgera málið um at stovna løgtingsumboðsmannaembætið og annars hevði sett pengar av ynskti eitt slíkt embætið. Tí fekk stýrisskipanarlógin § 39 ta orðing, at "Í løgtingslóg kann verða ásett, at Løgtingið velur uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins" uttan tó, at tað við hesum varð stovnsettur ein slíkur stovnur.

Eg síggi í gomlum skjølum hjá mær, at eg var rættuliga skeptiskur um ein løgtingsumboðsmannastovn. Í einum notati, sum eg havi skrivað til formansskap løgtingsins í 1997, sigi eg, at centrali spurningurin er at tryggja

- at umboðsmaðurin hevur neyðuga yrkisliga førleikan og er nóg óheftur at gera av, hvat er lógligt ella ikki, og fær tær neyðugu ytru umstøðurnar til at gera neyðuga eftirkanningararbeiðið

- at landsfyrisitingin vil, kann og hevur umstøður til at rætta seg eftir avgerðum løgtingsumboðsmansins.

Eg minnist, at eg tá nevndi, at tað var bara ein søguligur persónur, sum í roynd og veru uppfylti treytirnar at verða umboðsmaður – Guttormur í Múla. Lágvaksin, men sterkur, vitandi, ikki sørur í gandi, lógkønur og eina sera stóra respekt millum manna. Ongin setti spurnartekin við tað, Guttormur í Múla segði. Mítt tilmæli var tá at styrkja landsstýrismálanevndina við einum sterkum juridiskum sekretariati og at geva øktan møguleika hjá borgarum at fáa fría rættargongd í rættarkervinum.

Fólksligi áhugin fyri umboðsmannastovninum tyktist at verða lítil í 90'unum. Eg minnist, at Fróðskaparsetur Føroya hevði boðið til almennan fyrilestur á setrinum við luttøku av danska, norska og íslendska tingumboðsmanninum. Sjálvur møtti eg upp at lurta. Umframt teir almennu fylgisneytarnir við umboðsmonnunum vóru vit tríggir áhoyrarar.

Arbeiðsuppgávurnar og heimildirnar hjá umboðsmanninum eru helst eisini eitt sindur gruggutar í fólksins medviti. Hvør kennir ikki sangin hjá Shubidua, har teir siga, "vi finder os ikke i sexchikane, vi klager til ombudsmanden en af dagene". Ein strofa sum gevur útrykk fyri og styrkir fatanina í almenninginum um, at man kann fara til umboðsmannin við øllum meira ella minni ódefinerbarum problemstillingum og fáa teir loystar.

Um aldarskiftið kemur veruligt nýbrot í. Jenis av Rana, tingmaður hevur dirvi til at ganga einagongd í málinum á løgtingi, og hann ger, við hjálp frá Kristinu Samuelsen, sum tá starvaðist sum løgfrøðingur í løgtingum, uppskot til løgtingslóg um løgtingsins umboðsmann, sum hann leggur fyri tingið 14. desember 1999. Eftir onkrar smávegis broytingar undir nevndarviðgerðini verður tað samtykt, sum Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann. Fyrimyndin fyri lógini er mest lógin um fólkatingsumboðsmann frá 1996, men eisini úr hinum norðanlondunum.

Lógin ásetur í § 4, at umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at lands- og kommunalir myndugleikar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Eisini er ásett í § 11, at rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

Við øðrum orðum

- eitt juridiskt eftirlit, at lógir, kunngerðir og rættarsiðvenjur verða hildnar
- eitt slag av regluásetandi myndugleika at siga hvat er "góð fyrisitingarsiðvenja" ella ikki
- at gera tilmæli um at fara undir lóggávu ella at presisera lóggávu.

Tað er eitt sindur út í tað dunkla, hvønn løgtingsumboðsmaðurin umboðar. Er tað Løgtingið, sum eftirlitshavandi mótvegis fyrisitingini, ella er tað borgaranum mótvegis fyrisitingini. Tað er helst bæði. Men eg veit, at fólkatingsumboðsmaðurin hevur sagt, at hann metir seg at umboða borgaran mótvegis fyrisitingini og ikki at gera av trætur millum myndugleikar.

Produktið ella niðurstøðan, sum umboðsmaðurin kemur við, hava Bárður Larsen og Kári á Rógvi diskuterað í eini grein í lógariti í 2005. Teir gjøgnumganga har kritiskt tær fatanir, sum hava verið førdar fram um umboðsmannin, sum eitt slag av dómara, og hvørjum niðurstøðum man skal fylgja.

Sjálvur haldi eg, at fremsta uppgávan hjá løgtingsumboðsmanninum má vera at venda frustratión til inspiratión soleiðis at skilja, at frustreraði borgarin og frustreraða fyrisitingin, kann fáa eitt mál útgreinað og ummælt av løgtingsumboðsmanninum, soleiðis at málið, um neyðugt, verður tikið uppaftur og rættað antin aftureftir ella frameftir, soleiðis at fyrisitingin gerst uppaftur betur. Argumentini mugu telja, ikki valdið, tí at stovnurin er tilmælandi og hevur ikki formligar tvingsilsheimildir.

Hetta setur sjálvsagt nærum ómenniskjalig krøv til løgtingsumboðsmannastovnin. Ein interaktión fer í gongd. Er hann virdur av fyrisitingini og borgarum, verður hann ein hjálp, sum kann geva stabilitet hjá frustreraðum borgarum og fyrisiting. Hinvegin verður hann ikki virdur, gevur hann ikki stabilitet, og ein ónd ringrás byrjar. Tað ringasta sum henda kann hjá embætinum er, at eftirfylgjandi dómur er ósamdur við løgtingsumboðsmannatulkingini, og vandi er tá fyri, at embætið gerst sum heild ikki ein tulkingarendi á eini málsgongd, men bara eitt stig á leiðini.

## 2. Virki løgtingsumboðsmansins hesi 10 árini

Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, skeyt 2. november 2000 upp fyri løgtinginum at velja Jógvan Andreassen, sum fyrsta løgtingsumboðsmann. Løgtingið tók undir við honum og við atkvøðutalinum 31-0-0 varð Jógvan valdur løgtingsumboðsmaður. Jógvan hevði tá drúgvar royndir innan dómsvaldið í Føroyum. Hevði starvast sum dómarafulltrúi í Føroyum síðan 1964 og síðan 1977 sum formliga tilnevndur sorinskrivari. Tað løgfrøðiliga embætið, sum tá hevði hægstu tign í Føroyum. Valið var heppið. Virðingin fyri stovninum var alt fyri eitt til staðar, og væl var lagt til rættis hjá Jógvani hesa týdningarmiklu fyrstu tíðina.

Vegna aldur legði Jógvan frá sær seinast í 2005, og á tingfundi 23. november 2005 mælti Edmund Joensen løgtinginum til at velja Sólju í Ólavsstovu til løgtingsumboðsmann. Hetta varð samtykt við 28-0-0. Eisini hetta var eitt gott væl. Sólja hevur drúgvar royndir innan líkari fyrisiting teirri hjá okkum og eisini teirri grønlendsku. Hon hevur eisini ta virðing og yrkiskunnleika, sum krevst til slíkt embæti.

Longu í 1993 fáa vit eina fyrisitingarlóg og eina innlitislóg. Tær eru báðar, uttan hendinga undantaksføri, bein avskrift av teimum donsku fyrisitingar- og innlitislógunum, sum tá vóru. Fer man í løgtingstíðindi, so síggjast ongar serføroyskar umhugsingar í samband við, at lógaruppskotini um hesar lógir verða sett fram. Tær fara uttan hóvasták gjøgnum Løgtingið.

Veruleikin var tó tann, at hesar báðar lógir gjørdu ikki ta stóru broyting í fyrisitingini. Eg kann ikki dokumentera tað nærri, men havi ein varhuga av, at man fyrisat, sum man hevði gjørt frammanundan uttan at gáa serliga nógv um nýggju reglurnar. Í grundini vóru formligu reglurnar frá 1993 jú bara eina kodifikatión av áður galdandi óskrivaðu reglunum.

Hesi 10 árini vit hava havt ein løgtingsumboðsmannastovn, haldi eg, at stovnurin veruliga hevur gjørt mun í mun til respektina fyri hesum lógum.

Fyrr kom tað meira enn so fyri, at eitt skriv til tað almenna frá einum borgara als ikki varð svara ella svara aftaná sera langa tíð; onkur vil kanska siga óneyðuga og ógrundaða tíð. Her haldi eg at løgtingsumboðsmannastovnurin veruliga hevur sett seg í respekt. Ongin sum starvast innan fyrisitingina dámar, at ábyrgdin hjá honum liggur fyri, at eitt mál ikki verður avgreitt uttan ógrundaðan steðg. Hetta er nærum synonymt við dovinskap í almenninginum, og verður tað átalað í eini løgtingsumboðsmannaniðurstøðu, er tað sum at verða alment úthongdur í ein gabistokk. Og tað vilja almenn starvsfólk sjálvsagt gera alt fyri at sleppa undan. Hinvegin er hetta veruliga eisini ein kelda til frustratión hjá almennum starvsfólkum. Løgtingið setur ov lítlar resursir av til fyrisitingina, og løgtingsumboðsmaðurin tekur í sínum niðurstøðum ikki atlit at vantandi fyrisitingarligum resoursum, eitt nú viðvíkjandi langum svartíðum. Einstaki starvsmaðurin kemur tá av órøttum uppá ein ella annan máta at verða - uttan skyld – úthongdur sum ein vána fyrisitari. Eg kann ikki lata vera við at nevna Almannastovuna í hesum viðfangi. Stovnur við veldugari málsmongd, stórum trýsti, har avgerðin er týdningarmikil fyri móttakaran, og har avsetta administrativa orkan ikki røkkur til. Eg sigi ikki ein málsviðgera ringan fyri, at hann gerst frustreraður av eini umboðsmannaátalu um seina viðgerð.

Eg haldi eisini, at løgtingsumboðsmannastovnurin hevur havt eina ávirkan á journalskipanina hjá stovnunum. Tað sær betri út hjá stovninum, um hann, í samband við umboðsmannamál, kann lata løgtingsumboðsmanninum eitt væl skipað journalyvirlit við viðfestum skjølum í samband við klagu til løgtingsumboðsmannin. Eisini havi eg varhuga av, at betur gongur nú við at halda notatskylduna hjá fyrisitingini sbr. innlitislógini § 6, har ásett er, at í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Men helst er nakað eftir, áðrenn rokkið er á mál viðvíkjandi notatskylduni.

Í partshoyringarskylduni haldi eg eisini, at løgtingsumboðsmaðurin hevur gjørt mun. Í fyrisitingarlógini § 18 er nevniliga ásett, at má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar, og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Har hevur løgtingsumboðsmaðurin í fleiri førum tala at, at hoyring ikki er farin fram, og haldi eg, at tey allarflestu, sum starvast innan fyrisitingina av hesum átalum, eru farin at gáa um, at okkurt eitur partshoyring, sum tey mugu hugsa um, tá ið tey skulu taka eina avgerð.

Løgtingsumboðsmaðurin hevur hesi árini gjørt fyrisitingini púra greitt, at vit hava eina innlitislóg. Tað man ikki verða tann starvsmaður í fyrisitingini, sum ikki kennir høvuðsprincippini í innlitislógini, og at borgarin, sum altavgerðandi høvuðsreglu, hevur rættarkrav uppá innlit. Man er greiður yvir, at man ikki kann dylja skjøl eftir egnum høvdi.

Løgtingsumboðsmaðurin hevur eisini í hesi 10 árini vent focus hjá fyrisitingini á § 21 og 23 í fyrisitingarlógini, har ásett er, at ein fyrisitingarlig avgerð skal hava eina grundgeving. Grundgevingin skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinnanina av metingini. Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

Hetta fyri leikmannin merkiliga hugtakið, sum eitur "saklig fyrisiting", haldi eg eisini, at løgtingsumboðsmaðurin hevur gjørt nógv greiðari hjá borgarum og fyrisiting. Løgfrøðingar vita, at saklig fyrisiting merkir, at bert er loyvt at taka tey atlit, sum liggja aftanfyri lóggávuna, man fyrisitur, ella grundgevingina undir stovninum man rekur. Men hjá ikki løgfrøðinginum innan fyrisitingina, kann hetta hugtak ofta verða gruggut og fáa ein meira óspecifikkan týdning. Her haldi eg, at løgtingsumboðsmannastovnurin ofta hevur verið greiður í sínum úttalilsum, og ofta hevur borið til at brúkt tey sum fordømi í nýggjum eftirfylgjandi málum, sum eru komin upp.

Nú vit eru við hetta um fordømi hjá fyrisitingini, so er onki at ivast í, at útsagnir hjá løgtingsumboðsmanninum hava verið brúktar sum rættarkelda í alt størri mun hesi 10 árini, sum stovnurin hevur virkað. Ikki er altíð so greitt at vita, hvønn veg man skal fara í fyrisitingini, og tá er gott at hava eitt løgtingsumboðsmannaúttalilsi at halda seg til.

Minnist sjálvur mál, sum eg havi havt til viðgerðar á Løgmansskrivstovuni. Ein blaðmaður søkti um innlit í allar roknskapir og øll skjøl, notatir og annað, ið hevði samband við eina føroyska sendistovu uttanlands, meðan ávísur sendimaður starvaðist har. Eg avvísti umsóknini eftir innlitislógini § 4, stk. 3, tí at umsóknin var ikki nóg neyv. Umboðsmaðurin var ikki samd við hesum og helt, at ávísir partar vóru nóg neyvir, og at eg átti at vegleitt sbr. § 7, stk. 1. Eg var ikki samdur í hesi tulking, men havi í eftirfylgjandi málum broytt mína atferð, soleiðis at slík mál nú í staðin fáa tað útfallið, at blaðmaðurin verður boðin á fund á skrivstovuni at tosa um, hvussu til ber á einhvønn hátt at skera tað til, so innlit kann verða givið uppá onkran máta, í hvussu so er í partar. Eg haldi, at í sovorðnum føri hevur løgtingsumboðsmaðurin virka sum ein inspiratión.

Teir sum danski fólkatingsumboðsmaðurin so pent kallar teir sterkt resursekrevjandi persónarnir - tað sum vit onnur kalla kværulantar - hava eisini við umboðsmannaskipanini fingið eitt gott amboð, sum eftir mínum tykki er gott fyri bæði teir og fyrisitingina. Málini hanga ikki longur í leysum lofti. Ein avkláring verður fingin. Antin fáa teir ella fyrisitingin viðhald, og tað er báðum pørtum at gagni.

Hyggja vit í ársfrágreiðingarnar hjá løgtingsumboðsmanninum frá 2001 til í dag, síggja vit, at starvsfólka- og innlitismál fylla so nógv mest av teimum málum, umboðsmaðurin hevur viðgjørt. Fleiri ár meira enn helvtina av øllum málunum, okkurt árið minni enn helvtina, men nærum ongantíð undir triðingin. Almannamál og undirvísing tykjast ikki at fylla eins nógv í vavi í mun til, hvussu nógv virksemi er á hesum málsøkjum, sum jú fylla kanska helvtina av fíggjarlógini.

Eg haldi, at løgtingsumboðsmaðurin her er farin inn í eina óhepna gongd. Tá er tað í avsløgum uppá alment innlit frá journalistum nærum standardprocedura at kært verður til løgtingsumboðs¬mannin. Sama er eisini um at henda í uppsagnarmálum, har nærum øll mál uttan undantak verða kærd til løgtingsumboðsmannin. Sjálvsagt man kann ikki fora tí, men verða øll slík mál skotin inn fyri løgtingsumboðsmannin og viðgjørd har, fáa vit knappliga eina heilt nýggja stjórnarrættarliga skipan í slíkum málum. Samfelagið er jú av microslagi, so lítið skal til, at avskeiklað verður.

Í løgtingsumboðsmannalógini § 10 er ásett, at kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av lands- ella kommunalum umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

Formansskapurin fær ikki gjørt tað stóra við slík mál annað enn at konstatera, hvussu standurin er. Viðkomandi landsstýrismaður ella kommuna fær hinvegin tikið málið uppaftur og hevur møguleika til at rætta uppá skeivleikan, um umstøðurnar og viljin er til tess. Løgmaður hinvegin, hevur higartil, ta tíðina løgtingsumboðsmaðurin hevur virkað, verið nakað trilvandi í slíkum málum. Eg minnist, at fyrstu tíðina gjørdi løgmaður ofta tað, at hann sendi viðkomandi landsstýrismanni eitt bræv, har hann átalaði tað sama sum løgtingsumboðsmaðurin og bað hann fáa viðurskiftini í rættlag. Men aftaná at komið er eftir, at statsministarin vanliga ikki reagerar formliga móti ministerium, sum hava fingið álvarsliga átalu frá fólkatingsumboðsmanninum er hendan mannagongd slept.

Sbr. stýrisskipanarlógini § 33, stk. 3 hevur løgmaður eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Kemur ein álvarslig átala frá løgtingsumboðs-manninum, er tað tann stóra reyða ávaringarlampan sum fer at lýsa, og løgmaður má tá aktivera § 33, stk. 3.

Vanliga reaktiónin sbr. § 33, stk. 3 vil verða, at løgmaður óformliga heitir á viðkomandi landsstýrismann um at taka málið upp til nýggja viðgerð. Eisini hevur hann møguleika at flyta viðkomandi málsøkið til annan landsstýrismann, deils sum eina disiplinera reaktión, og deils í eini vón um, at nýggi dugur betri at fyrisita. Er út av lagi statt, kann løgmaður gera av at fráseta landsstýrismann. Er burtur úr vón og viti statt, ber sjálvsagt til hjá løgmanni at reagere rættarliga vegin.

Eitt er at hava rætt, nakað heilt annað er at fáa rætt, sigur eitt populerhugtak. Løgtingsumboðs-maðurin kann t.d. koma við niðurstøðu um, at ikki var rætt atborið, tá ið eitt starv var sett, og kann geva einum umsøkjara, sum t.d. søkti starv, viðhald í kæruni. Men landsstýrið fær onki gjørt við støðuna. Starvið er sett. Setti umsøkjarin er líka fremmandur í fyrisitingini sum klagarin, og til ber ikki at annullera setanina grundgivið í setanarviðurskiftunum. Hann hevur fingið eina begunstigandi forvaltningsakt. Skal setanin annullerast, má farast fram eftir uppsagnarmannagongdini. Og neyvan er tað sakligt at uppsiga einum júst settum starvsmanni við teirri grundgeving, at man sjálvur hevur gjørt ein feil í fyrisitingini. Og har er ein óendalig røð av øðrum begunstigum forvaltningsaktum, har støðan er akkurát hin sama. Men sjálvsagt kunnu umstøður vera – ónd trúgv ella líknandi - sum gera, at tað ber til at afturtaka tað begunstigandi forvaltningsaktina. Men klagandi borgarin verður ikki inspireraður av hesi gongd. Tvørturímóti frustreraður. Men kanska tað hjálpir eitt sindur uppá frustratiónina hjá borgaranum, um onkur disipliner reaktión verður antin móti tí tænastumanni, sum hevur verið fremstur í órættinum ella tí ábyrgdarhavandi landsstýrismanninum.

Síðan stovnsetingina av løgtingsumboðsmannaembætinum í 2001 eru 24 álvarsligar átalur sbr. umboðsmannalógini § 10 givnar.

í 2001 var ongin givin.

Í 2002 fýra:

• átala í sambandi við setan av Landsverkfrøðingi við atliti at fráboðan til teirra, sum ikki vórðu sett í starvið

• átala í sambandi við mannagongd í sambandi við vantandi starvsetan av lærara á Føroya

Studentaskúla og HF skeiði á sumri 2000 og 2001

• átala í sambandi við, at Mentamálaráðið noktar umsókn frá lærara um at broyta ársmetini

hjá 2 næmingum á Føroya Studentaskúla og HF- skeiði

• átala í sambandi við, at Fiskimálastýrið skrásetir ræðisavmarking viðvíkjandi fiskibáti, hóast eigarin hevur heitt á stýrið um at strika avmarkingina

Í 2003 ein:

• átala um handfaring Fiskimálaráðsins av umbøn frá blaðmanni um alment innlit

Í 2004 tvær:

• átala um, at Tórshavnar Kommuna ikki hevur svarað umbøn um innlit frá Útvarpi Føroya

• átala um, at Tórshavnar Kommuna ikki hevur svarað borgara í sambandi við fyrispurning um innlit í málið um spreinging og útgrevstur

Eg havi ikki kannað, hvørji stig landsfyrisitingin hevur tikið í samband við hesar álvarsligu átalurnar frá 2001 - 2004, men eg havi kannað, hvørji stig eru tikin av teimum álvarsligu átalunum frá 2005 og frameftir.

Í 2005 fýra:

• átala til Mentamálaráðið fyri handfaring av starvsetan av umsøkjara til starv á Føroya

Læraraskúla, herundir tíðina at lata henni setanarbræv

Mentamálaráðið endurrindaði hereftir ávísar útbúgvingarútreiðslur, sum klagarin hevði havt, men vildi ikki rinda sakførarakostnað. Lønaraldursspurningurin var eisini avgreiddur.

• átala til Tvøroyrar Kommunu og Almanna- og heilsumálaráðið fyri handfaring av máli

um setan av avloysara fyri leiðaran á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri

Almannaráðið gav kommununi kravboð um at fylgja løgtingsumboðsmanniðurstøðuni. Gjørt var eftir boðunum.

• átala til Fiskimálaráðið fyri mannagongd í sambandi við setan av maskinmeistarum á Fiskiveiði¬-eftirlitinum

Fiskimálaráðið sigur frá, at tað framyvir leggur áherðslu á at fylgja setanartreytunum og ætlar sær framyvir altíð at hava ein løgfrøðing í setanarbólkinum at tryggja, at rætt verður farið fram.

• átala til Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið fyri lønarflokking av lærarastarvi á Føroya Læraraskúla (sami kærari sum í málinum um setanarbræv)

Í 2006 fýra:

• átala til Kærunevndina fyri arbeiðsloysisskipanina fyri ikki at vilja taka mál uppaftur frá kærara, hóast umboðsmaðurin metir, at avgerðin hjá Kærunevndini er skeiv

Kærunevndin sigur seg ikki vera sinnaða at taka málið uppaftur og vísir til, at hon er ikki samd við tulking løgtingsumboðsmansins.

• átala til Arbeiðsloysisskipanina fyri mannagongd í sambandi við setan av málsviðgerðum á tryggingardeildini í tveimum førum og fyri ikki at hava givið klagara fult skjalainnlit

Arbeiðsloysisskipanin sigur, at málið seinni er loyst í samráð við klagaran. Arbeiðsloysisskipanin sigur, at mannagongdirnar eru eftirfylgjandi tillagaðar, og at partshoyring nú er ein natúrligur partur í samband við setan. Somuleiðis eru mannagongdirnar í samband við innlit broyttar tilsvarandi.

• átala til Føroya Kærustovn (Skuldarumskipanarnevndina) og Vágs Kommunu fyri viðgerð teirra av umsókn um eftirgeving av skatti

Málið varð tikið uppaftur og grundgivið av nýggjum. Úrslitið var kortini tað sama. Ongin skattaeftirgeving.

• átala til Innlendismálaráðið fyri handfaring av trimum uppsagnum á Matrikulstovuni

Innlendismálaráðið ógildaði uppsagnirnar og fólkini fingið tilboð um at koma aftur til arbeiðis.

Í 2007 tríggjar:

• átala til Mentamálaráðið viðvíkjandi handfaringini av einum innlitsmáli

Mentamálaráðið boðaði frá, at tað tók málið til eftirtektar, og mannagongdirnar í sambandi við avgreiðslu av málum um alment innlit vóru broyttar samsvarandi tilmælunum frá Løgtingsins umboðsmanni.

• átala til Tórshavnar kommunu viðvíkjandi viðvíkjandi viðgerðini hjá av einum setanarmáli

Tórshavnar kommuna endurmetti eftirfylgiandi og broytti setanarmannagongdir sínar fyri at tryggja, at tílík mál ikki kunnu endurtaka seg.

• átala til Tvøroyar kommunu viðvíkjandi viðgerðini av einum máli um setan av brunaumsjónar-manni

Tvøroyrar kommuna svaraði aftur, at hon tók átaluna til eftirtektar og var samd við Umboðsmanninum í, at handfaringin av hesum máli var alt annað enn nøktandi. Kommunan sigur, at hon hevur eftirfylgjandi lagt seg eftir at fylgt lógum og sáttmálum í sambandi við starvsetanir.

Í 2008 tvær:

• átala til Tvøroyrar kommunu fyri ikki at hava givið umboðsmanninum rættar upplýsingar í setanarmálinum av brunaumsjónarmanni

Kommunan segði, at eftir omanfyri nevndu átalu frá umboðsmanninum gjørdi ein av teimum, sum var nevndur í frágreiðingini frá kommununi til umboðsmannin, vart við, at viðkomandi ikki hevði verið við í setanartilgongdini. Eftir at hava kannað málið nærri, kom kommunan til ta niðurstøðu, at rætt var, at viðkomandi hevði ikki verið við í setanartilgongdini. Kommunan harmast henda feil og ger vart við, at tað ikki var tilvitað, at kommunan hevði givið umboðsmanninum skeivar upplýsingar

• átala til Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðið um handfaringina av klagu um leiðaran á sambýlinum á Mýrini

Almanna- og heilsumálaráðið boðaði frá, at teir høvdu sent skriv til Nærverkið, um at taka hesa álvarsligu átalu upp til viðgerðar, og at slíkt ikki endurtók seg. Nærverkið sendi síðan kunningarskriv út til allar leiðarar undir Nærverkinum, har kunnað varð um málið og niðurstøðuna hjá umboðsmanninum. Eisini var í skrivinum heitt á allar stovnar og øll sambýli um at vísa ein virknan starvsfólkapolitikk og at skapa trygd og menning á arbeiðsplássunum.

Í 2009 tvær:

• átala til Innlendismálaráðið viðvíkjandi seinari málsviðgerð av kærumáli um uppsøgn av havnameistara

Eg havi ikki ordiliga fingið greiðu á, hvat ið víðari er hent í hesum málinum.

• átala til Uttanríkisráðið um handfaringina av setan av deildarstjórastarvi á Løgmansskrivstovuni

Uttanríkisráðið boðaði frá, at tað tók átaluna til eftirtektar og fór frameftir at tryggja sær, at tílík viðurskifti verða handfarin á tryggan og nøktandi hátt.

Í 2010 tvær:

• átala til Hvalbiar kommunu um handfaringina av eini innlitsumbøn

Eg havi ikki ordiliga fingið greiðu á, hvat eftirfylgjandi er hent í hesum máli, men ørminnist um at hava hoyrt tíðindastubba, har kommunan boðaði frá, at hon tók átaluna til eftirtektar, og at innlitið varð givið.

• átala til Innlendismálaráðið og Vinnumálaráðið viðvíkjandi málsviðgerð í samband við at løggilda grannskoðarar

Løgmaður hevur í hesum málið gjørt av at fara undir eina gongd at kanna, hvørt tað ber til at taka aftur av órøttum givnar løggildingar og hevur annars avgjørt at fara undir displinerar kanningar av ábyrgdarhavandi aðalstjórum í málinum.

Skulu vit samanfata viðgerðina hjá myndugleikunum av teimum álvarsligu løgtingsumboðsmanna-átalunum, kunnu vit siga, at fyrisitingin næstan altíð harmast um mistøkini og letur seg inspirera av átaluni til at tilrætta framtíðar viðgerð av málum sbr. tey viðurskiftini, sum átalað verður. Sum eg dugi at síggja, er tað bara í einum føri, at fyrisitingin snøgt sagt hevur boðað frá, at hon fer ikki at fylgja løgtingsumboðsmannaniðurstøðuni, tí at hon er ikki samd við løgtingsumboðsmanninum. Ein snaring av viðgerðini av álvarsligum umboðsmannaátalum er kanska við at henda í sokallaða grannskoðaramálinum, har stig eru um at verða tikin til tænastumannakanning og annulatión í málinum. Men mangir leikir eru í longum talvi, so vit fáa at síggja, hvussu verður.

Tríggir eftirlitsstovnar vevja líkasum eitt sindur uppí virkseminum hjá hvørjum øðrum. Landsstýrismálanevnd løgtingsins við trimum løgtingsmonnum hevur, eftir stýrisskipanarlógini § 38, stk. 1, eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt. Løgmaður hevur, eftir stýrisskipanarlógini § 33, stk. 3, eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Løgtingsumboðsmaðurin hevur eftirlit við fyrisiting heimastýrisins eftir stýrisskipanarlógini § 39.

Hesi 10 árini, løgtingsumboðsmaðurin hevur virkað, hevur líkasum útviklað seg ein praksis, soleiðis at meginreglan er, at løgtingsumboðsmaðurin tekur sær av klagum um fyrisitingina sum slíka generelt. Landsstýrismálanevndin hevur meira tikið sær av málum, sum politikarar reisa um ólógliga fyrisiting, og føri har landsstýrismaðurin persónliga hevur verið ákærdur fyri at seta lóggávu til viks. Løgmanseftirlitið hevur verið, tá ið hetta hevur verið aktuelt, antin tí at klagað hevur verið til løgmans um vána fyrisiting hjá landsstýrismanni, men eisini tá ið løgmaður sjálvur hevur ynskt, at málið hevur verið tikið upp. Løgmanseftirlitið hevur at kalla verið eitt meira "burtur úr vón og viti eftirlit", har stig hava verið tikin, tí at upplagt hevur verið, at lóggáva hevur verið sett til viks. Løgmanseftirlitið hevur ikki verið eins djúptgangandi og løgtingsumboðsmannaeftirlitið.

## 3. Økið sum løgtingsumboðsmaðurin átti at uppprioritera

Nógv tann størsta orkan hjá løgtingsumboðsmannaembætinum er hesi árini løgd av til viðgerð av innkomnum klagum.

Av egnum upptiknum málum, síggi eg eina eftirlitsvitjan á psykiatriska deplinum í 2002, ein kanning av 70 ymiskum málum hjá Almannastovuni í 2005, ein eftirlitsvitjan á serstovninum á Bóndaheygi 14 í 2007, kanning av nøkrum fyritíðar- og endurbúgvingarmálum á Almannastovuni í 2008. Kanska eru onkur onnur, sum eg ikki havi gáa um.

Spurningurin er, hvørt tað ikki átti at verið broytt eitt sindur uppá hesa gongd. Tað at klagað verður til løgtingsumboðsmannin er uppá ein ella annan hátt eitt útrykk fyri, at klagarin enn hevur eitt sindur av resursum. Tann púra hjálparleysi hevur ikki slíka orku og klagar tí ikki. Tað er, sum tá ið ambulansumaðurin kemur á skaðastaðið ikki altíð vest statt hjá tí, sum venar seg verst. Standurin er ofta uppaftur verri hjá tí, sum onki sigur. So kanska burdi embætið umhugsa at sett eina árliga kvotu av sínari orku til egnar kanningar og so bara livað við, at kærutíðin hjá klagarum dró út. Umboðsmaðurin má eisini seta dagsskránna fyri, hvørja kós stovnurin heldur og ikki bara klagararnir.

Eg havi ikki havt stundir til at greina út, hvørji málsøkið ikki hava verið fyri so gjøllum kanningum, veit bara, at nøkur eru uppprioriterað í mun til onnur, eitt nú, sum eg nevndi í áðni, starvsfólkamál og innlitismál.

Stovnurin kundi gjørt t.d. slíkar trolingar, sum gjørdar vóru á Almannastovuni í 2005 og 2008, á øðrum stovnum eisini t.d. í fiskivinniumsitingini ella innan undirvísingarkervið.

Eg veit ikki, hvussu djarvur ein løgtingsumboðsmaður skal vera. Tað er altíð ein balanca í millum at verða djarvur og býttur. Men sum nevnt, so skal løgtingsumboðsmaðurin eftir umboðsmannalógini § 12, tá ið hon rakar við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Tað er í roynd og veru ein lóg, sum er týdningarmiklari fyri fyrisitingina enn fyrisitingarlógin, nevniliga fíggjarlógin. Fær ein stovnur ikki neyðugu játtanina, so verður fyrisitingin proportionalt líka vánalig. Tað er næstan ein matematisk ómøguligheit, tá ið løgtingsumboðsmaðurin í sínum niðurstøðum als ikki tekur hædd fyri fíggjarligum umstøðum, sum gera, at vónleyst er at halda fyrisitingini uppi. Av sonnum skapar hetta frustrerað starvsfólk. Tá haldi eg, at løgtingsumboðsmaðurin kann venda frustratión til inspiratión hjá starvsfólki og borgarum, um hon, í førum har heilt út av lagi er statt, vísandi til umboðsmannalógina § 12, vísir á, at hægri játtan skal til, skal fyrisitingin vera forsvarlig.